## Ungdómskonsert í TUTLhandlinum

Felagið Tutl er farirð undir eitt miðvíst ungdómsarbeiði, tí fara vit nú eisini at bjóða meir og minni royndum ungdómum, at spæla í TUTLhandlinum. Fríggjadagin 2. Oktober spælir 17 ára gamli Sigmund V. Zakariassen, sum bæði skrivar tekst og smíðar síni egnu løg. Sigmund spælir gittar og tónleikastílurin er Singer/songwriter. Til dagligt gongur hann í 1.g uppi í Hoydølum. Øll eru hjartaliga vælkomin til ókeypis konsert í TUTLhandlinum, har vit bjóða kaffi og te til tystar sálir.

# Hassjmaður er varðhaldsfongslaður

**Ein maður varð í gjár handtikin, eftir at løgreglan fann yvir 170 hassjplantur í húsunum við Norðskála. Maðurin var í morgun grundlógaravhoyrdur, og er varðhaldsfongslaður í 14 dagar**

POLITI

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Í rættinum varð avgjørt, at ongir upplýsingar í málinum skuldu upplýsast, eftir at ein maður í 30unum varð handtikin við Norðskála í gjár, tí hann hevði einar 170 hassjplantur í húsinum*

Uttan fyri eini hús við Norðskála stóð seinnapartin í gjár ein politibilur. Stóri, blái bilurin var á tremur av grønum vøkstri, tí løgreglan hevði nevniliga gjørt ratsia í húsunum og funnið yvir 170 hassjplantur.

Maðurin í húsunum varð handtikin seinnapartin og í gjárkvøldið var maðurin avhoyrdur av løgregluni.

Í morgun var maðurin til grundlógaravhoyring, tí ákæruvaldið vildi seta mannin í varðhaldsfongsul.

Ákærin í málinum vildi ikki upplýsa, hví maðurin skal varðhaldsfongslast, men sambært øðrum ákæra er møguleiki fyri, at orsøkin til ynski um varðhaldsfongsling er, at ákærdi ikki skal forða uppkláringini av sakini.

- Eg kann ikki úttala meg um konkretu sakina, men vanliga er tað fyri at tey ikki skulu forða uppkláringini av sakini, sigur Finn Ougaard frá ákæruvaldinum.

Eftir umhugsunartíð avgjørdi dómarin, at dyrnar skuldu vera dupultstongdar, sum merkir, at onki frá rættarfundinum verður upplýst. Hetta kundi bent á, at sakin er rættiliga viðkvom.

### Fingu ábending

Bergleif Brimvík, kriminalovasti, staðfestir, at orsøkin til, at løgreglan gjørdi ratsia í gjár, er at hon hevði fingið eina ábending, um at okkurt gekk fyri seg í húsunum.

- Vit fingu eitt tipp, men vit hava havt illgruna rættiliga leingi, staðfestir Bergleif Brimvík, kriminalovasti.

Hann staðfestir eisini, at talan er um mann í 30unum, sum varð handtikin í gjár.

### Fyltu salatfat

Kriminalovastin staðfestir eisini, at hóast talan var um 170 plantur, so var ikki neyðugt við lastbili ella nøkrum tilíkum.

- Planturnar vórðu settar í salatfatið, og tær fyltu rættiliga nógv, staðfestir Bergleif Brimvík.

# Gramsa á netinum



**Á middegi varð nýggjur matportalur gjørdur almennur. Mortan í Hamrabyrgi er stigtakari og ritstjóri og síðan er um mat og drekka**

MATUR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

grams.fo er heitið á nýggjari heimasíðu, sum snýr seg um mat og drekka. Á síðuni ber millum annað til at síggja yvirlit yvir matstovurnar í Føroyum, ábendingar um røtt víngløs, umframt ummæli av fleiri ymiskum vodkum.

- grams.fo fer at gerast eitt tíðarleyst vaksandi dátusavn við góðum leitingarmøguleikum. Pallurin er alnótin, ið gevur spennandi talgildar møguleikar, eitt nú fyri myndasøvnum og kykmyndum, sigur Mortan í Hamrabyrgi í tíðindaskrivi.

Hann leggur afturat, at umframt vælkendu vín- og matummæliniverður farið undir at ummæla útgerð og at lata hent prei.

Ummælini hava verið hýst í báðum størru bløðunum seinastu árini.

### Rís og rós

Ætlanin við grams er sambært ritstjóranum at upplýsa, kunna, greiða frá, og at rósa og finnast at ymiskari matgerð.

Somuleiðis verður ein teigur, sum verður róptur »Fiskatorgið í Vágsbotni.« Her ber til hjá seljarum um alt landið at kunna um, nær tey eru í Havn og hvat tey fara at selja á Fiskatorginum í Vágsbotni.